**Skjal 3**

# Kunngerð av protokoll frá 11. mars 1997 til broyting av tvískattasáttmálanum millum Danmark og Schweiz

Tann 11. mars 1997 varð ein protokolll undirskrivað í Keypmannahavn við Schweiz til broyting av sáttmálanum frá 23. november 1973 til at sleppa undan tvískatting, í tann mun tað snýr seg um inntøku- og ognarskattir.

Protokollin er soleiðis orðað:

**PROTOKOLL TIL BROYTING AV SÁTTMÁLANUM MILLUM KONGARÍKIÐ DANMARK OG SCHWEIZISKA SAMVELDIÐ TIL AT SLEPPA UNDAN TVÍSKATTING Í TANN MUN TAÐ SNÝR SEG UM INNTØKU- OG OGNARSKATTIR**

Stjórnin í Kongaríkinum Danmark og stjórnin í Schweiziska Samveldinum,
sum ætla at broyta sáttmálan millum Kongaríkið Danmark og Schweiziska Samveldið til at sleppa undan tvískatting í tann mun tað snýr seg um inntøku- og ognarskattir, undirskrivaður í Bern tann 23. november 1973
(hereftir umtalaður sum »sáttmálin«), eru vorðnar samdar um hetta:

**Grein 1**
Allar viðtøkur um ella tilvísingar til ognarskatt í sáttmálanum skulu bert verða nýttar í tann mun, at báðir sáttmálasamtykkjandi statirnir álíkna ognarskatt.

**Grein 2**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 3**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 4**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 5**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 6**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 7**
(Er skrivað inn í sáttmálan)

**Grein 8**
(Er ikki tikin við)

Vegna Kongaríkið Danmark:
Carsten Koch
Vegna Schweiziska Samveldið:
Andre von Graffenried
Protokollin kom sambært grein 8 í gildi tann 30. december 1997.